Betri Pensjón P/F

# Hálvársfrásøgn 2019




JÓGVAN



# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| 5 ára yvirlit | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Uppgerð av broyting í eginogn | 10 |
| Notur | 11 |
| Leiðsluátekning | 13 |
| Partafelagsupplýsingar | 14 |

# 5 ára yvirlit

| DKK 1.000 | 1H 2019 | 1H 2018 | 1H 2017 | 1H 2016 | 1H 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl** | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | |
| Tryggingargjøld / Eftirlønargjøld | 70.643 | 73.806 | 72.879 | 58.441 | 54.212 |
| Tryggingarveitingar | -16.457 | -18.347 | -15.893 | -13.477 | -12.614 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 81.582 | 5.915 | 9.400 | 11.391 | 26.124 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingar- /eftirlønarvirksemi | -6.694 | -5.848 | -5.558 | -8.166 | -7.485 |
| Úrslit av endurtrygging | -360 | -311 | -257 | -308 | -339 |
| Tryggingar- / Eftirlønartekniskt úrslit | 7.091 | 192 | 115 | -649 | -2.639 |
| Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutr. | -418 | 1.429 | 351 | 823 | 233 |
| Úrslit | 7.463 | 2.048 | 1.798 | 1.434 | 4 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- /eftirlønar- og íløguavtalur, í alt | 1.299.669 | 1.165.861 | 1.047.756 | 910.916 | 806.023 |
| Eginogn í alt | 77.636 | 70.204 | 65.662 | 39.349 | 43.473 |
| Ognir í alt | 1.388.336 | 1.241.384 | 1.117.114 | 953.034 | 856.011 |
| **Lyklatøl** | | | | | |
| Úrslit av íløguvirksemi í prosent av marknaðarrentuproduktum | 6,6% | 1,1% | | | |
| Váði á úrsliti av íløguvirksemi av marknaðarrentuproduktum[1)] | 2 | | | | |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,5% | 0,5% | 0,8% | 0,9% | 1,0% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 367 kr. | 343 kr. | 499 kr. | 563 kr. | 613 kr. |
| Renting av eginogn eftir skatt | 10,1% | 3,0% | 3,3% | 3,7% | 0,0% |

5 ára yvirlit er gjørt við støði í kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum (kunngerð nr. 4). Við virknað frá 1. januar 2019 er nýggj kunngerð sett í gildi. Samanberingartøl eru tillagað nýggju kunngerðini. Tað hevur tó ikki verið gjørligt at gera tølini fyri árini 2015–2017. Vísandi til §147, stk. 2 í kunngerð nr. 4 er Váði á úrsliti av íløguvirksemi av marknaðarrentuproduktum einans víst fyri 2019.

[1)] Váði á úrsliti av íløguvirksemi av marknaðarrentuproduktum er gjørt upp samsvarandi skjal 9 til kunngerð nr. 4 og úrsliti vísir til talvu í skjal 9 við váðabólkum

# Leiðslufrágreiðing

## Eigaraviðurskifti

Betri Pensjón P/F rekur pensjóns- og lívstryggingarvirksemi á føroyska marknaðinum.

Felagið, sum varð stovnað í 2006, fór undir virksemi í 2007. Felagið er tí framvegis ungt og í framhaldandi menning.

Betri P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F, og eigur allan partapeningin í felagnum.

## Úrslitið fyri fyrra hálvár 2019

Tryggingargjøldini, íroknað innskot, fullu frá 73,8 mió. kr. í fyrra hálvári 2018 til 70,6 mió. kr.

Avkastið frá íløguvirksemi varð 81,6 mió.kr. í fyrra hálvári 2019 móti kr. 5,9 mió. í fyrra hálvári 2018.

Tryggingarveitingarnar vóru 15,2 mió. kr. fyrra hálvár 2019 móti 18,6 mió. kr. fyrra hálvár 2018.

Rakstrarútreiðslurnar vóru 6,7 mió. kr. ímóti 5,8 mió. kr. fyrra hálvár 2018.

Rakstrarúrslitið eftir skatt gjørdist 7,5 mió. kr. móti 2,0 mió. kr. í fyrra hálvári 2018.

Nýttur roknskaparháttur er tillagaður í mun til nýggju roknskaparkunngerðina, sí 'Nýttur roknskaparháttur' og 'Uppgerð av broyting í eginogn'.

Úrslitið fyri tíðarskeiðið verður mett nøktandi.

## Viðmerkingar til fíggjarstøðuna

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón øktist frá 1.258,0 mió. kr. til 1.388,3 mió. kr. í fyrra hálvári 2019. Lívstryggingaravsetingar øktust úr 1.178,3 mió. kr. í 1.299,7 mió. kr.

Eginognin tann 30. juni 2019 var 77,6 mió. kr.

## Váðar, ið kunnu ávirka úrslitið

Betri Pensjón metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Felagið nýtir væl skipaðar mannagongdir fyri at stýra váðunum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi, yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórn og leiðsla alsamt halda eyga við verða hildnar.

Marknaðarváðin er váðin fyri, at dagsvirði á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum, so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón er marknaðarváðin størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløguætlan fyri partabrøv. Felagið avmarkar eisini marknaðarváðan við at grunda virksemi sítt á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan av egnum íløgum. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

Teir tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan tal av andlátum og sjúkrameldingum ávirka veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har eftirlønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, hann sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Felagið kann vera fyri fíggjarligum tapi vegna operationellan váða. Hesin kann eisini skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feil í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki.

Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør, fylgir felagið neyvt við marknaðargongdini. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu, opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan.

## Kapitalur og solvensur

Við virknað frá 1. januar 2019 er nýggj solvenskunngerð sett í gildið. Nýggju solvensásetingarnar hava ført við sær broytingar í nýttum roknskaparhátti. Broytingin merkir, at frá 1. januar 2019 er eginogn felagsins minkað við samlað 1,3 mió. kr.

Eginogn felagsins tann 30. juni 2019 var 77,6 mió. kr. ímóti 70,2 mió. kr. tann 30. juni 2018.

Solvenskravið (individuella solvenskravið), roknað eftir ásetingunum í nýggju kunngerðini, var 27,6 mió. kr. tann 30. juni 2019.

Grundarfæfeingið við hálvárið 2019 var 77,1 mió. kr., og solvensdekningur felagsins var 279,3% ella 49,5 mió.kr. omanfyri fæfeingiskravið.

## Útlit fyri 2019

Við árslok 2018 varð mett, at raksturin fyri 2019 fór at geva eitt avlop millum 3 og 6 mió.kr. Gongdin í fyrra hálvárið hevur verið betri enn væntað, bæði orsakað av góðum váðaúrsliti og góðum íløguúrsliti. Hóast ilt er at meta um gongdina á virðisbrævamarknaðum og innan lívstryggingarvirksemi, verður nú mett, at raksturin fyri 2019 fer at geva eitt avlop millum 5 og 9 mió.kr.

## Serligar hendingar

Eftir roknskaparlok eru ongar týðandi hendingar, sum broyta metingina av hálvársfrásøgnini.

## Rakstrarroknskapur

| Nota | DKK 1.000 | 1H 2019 | 1H 2018 |
|---|---|---|---|
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning** | | |
| | Tryggingargjøld brutto | 71.003 | 74.117 |
| | Endurtryggingargjøld | -360 | -311 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **70.643** | **73.806** |
| | **Íløguvirksemi** | | |
| | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 11.381 | 18.366 |
| | Virðisjavningar | 71.951 | -11.001 |
| | Rentuútreiðslur | 0 | -10 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.750 | -1.440 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **81.582** | **5.915** |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning** | | |
| | Útgoldnar veitingar | -15.245 | -18.607 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-15.245** | **-18.607** |
| | **Broyting í lívstryggingaravsetingum fyri egna rokning í alt** | | |
| | Broyting í lívstryggingaravsetingum | -120.910 | -54.198 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-120.910** | **-54.198** |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning** | | |
| | Útveganarkostnaður | -2.670 | -1.688 |
| | Fyristingarkostnaður | -4.024 | -4.160 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-6.694** | **-5.848** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -2.284 | -877 |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **7.091** | **192** |
| | Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi | -418 | 1.429 |
| | Íløguúrslit av eginognini | 2.284 | 877 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **8.957** | **2.498** |
| | **Skattur** | **-1.495** | **-450** |
| | **Úrslit** | **7.463** | **2.048** |

| Nota | DKK 1.000 | 30.06.2019 | 31.12.2018 |
|---|---|---|---|

# Fíggjarstøða

## Ogn

| | 30.06.2019 | 31.12.2018 |
|---|---|---|
| **Immateriell ogn** | **156** | **312** |
| **Materiell ogn** | | |
| Rakstrargøgn | 100 | 200 |
| **Materiell ogn í alt** | **100** | **200** |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| Íløguprógv | 65.344 | 59.548 |
| Innlán í kreditfeløgum | 25.844 | 16.727 |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt** | **91.188** | **76.275** |
| **Íløguogn í alt** | **91.188** | **76.275** |
| **Íløguogn tengd at marknaðarrentuproduktum** | **1.288.365** | **1.168.667** |
| **Áogn** | | |
| **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur** | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum | 3.569 | 4.415 |
| **Áogn í sambandi við beinleiðis tryggingaravtalur í alt** | **3.569** | **4.415** |
| Onnur áogn | 0 | 285 |
| **Áogn í alt** | **3.569** | **4.700** |
| **Onnur ogn** | | |
| Útsett skattaogn | 341 | 299 |
| **Onnur ogn í alt** | **341** | **299** |
| **Tíðaravmarkingar** | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga | 1 | 32 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 4.617 | 7.474 |
| **Tíðaravmarkingar í alt** | **4.617** | **7.506** |
| **Ogn í alt** | **1.388.336** | **1.257.957** |

# Fíggjarstøða

## Skyldur

| Nota | DKK 1.000 | 31.12.2019 | 31.12.2018 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 70.000 | 70.000 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 35.000 | 35.000 |
| | Framflutt úrslit | -27.364 | -34.826 |
| | **Eginogn í alt** | **77.636** | **70.174** |
| | **Lívstryggingaravsetingar** | | |
| | Lívstryggingaravsetingar | 1.299.669 | 1.178.279 |
| | **Lívstryggingaravsetingar í alt** | **1.299.669** | **1.178.279** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í samband við beinleiðis trygging | 1.108 | 470 |
| | Skuld til atknýtt virkir | 2.249 | 723 |
| | Onnur skuld | 4.483 | 4.201 |
| | **Skuld í alt** | **7.840** | **5.394** |
| | **Tíðaravmarkingar** | **3.191** | **4.111** |
| | **Skyldur í alt** | **1.388.336** | **1.257.957** |
| 1 | Nýttur roknskaparháttur | | |

# Uppgerð av broyting í eginogn

| DKK 1.000 | Partapeningur | Yvirkursgrunnur | Flutt úrslit | Eginogn |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2018** | **70.000** | **35.000** | **-35.497** | **69.503** |
| **Rørslur á eginognini í 2018** | | | | |
| Ársúrslit | | | 2.017 | 2.017 |
| **Eginogn 31. desember 2018** | **70.000** | **35.000** | **-33.480** | **71.520** |
| **Broytingar í nýttum roknskaparhátti pr. 1 januar 2019** | | | **-1.347** | **-1.347** |
| **Eginogn 1. januar 2019** | **70.000** | **35.000** | **-34.826** | **70.174** |
| **Rørslur á eginognini í 2019** | | | | |
| Úrslit | | | 7.463 | 7.463 |
| **Eginogn 30. juni 2019** | **70.000** | **35.000** | **-27.364** | **77.636** |

# Notur

**Nota** **DKK 1.000**

**1** **Nýttur roknskaparháttur**

## Alment

Hálvársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum.

Við virknað frá 1. januar 2019 er kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum broytt, samanber kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 4).

Umframt framløgubroytingar eru eisini hendar broytingar í virðisásetingini av tryggingarteknisku avsetingunum, sum sambært nýggju kunngerðini skal innihalda eitt váðaískoyti til at dekka váðan fyri fráviki millum bestu meting og endaliga uppgerð av tryggingarteknisku avsetingunum. Broytingar eru eisini í rentukurvuni, ið verður nýtt í til at diskontera tryggingarteknisku avsetingarnar, her skal brúkast rentukurva, sum er fastløgd í Solvency II (EIOPA rentukurva).

Roknskaparliga ávirkanin av broytta roknskaparháttinum og týdningurin fyri framløgu eru nærri lýst niðanfyri.

Fyriuttan omanfyri og niðanfyri ávístu broytingar, er nýttur roknskaparháttur óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2018, og verður tí víst til hesa.

Hálvársfrásøgnin fyri 2019 er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Nýggja roknskaparkunngerð

### Váðaískoyti

Avsetingarnar til endurgjøld skulu sambært nýggju kunngerðini innihalda eitt váðaískoyti. Broytingin hevur neiliga ávirkan á eginogn felagsins pr. 1. januar 2019 á 1,3 mió.kr.

### Skattur

Skattur av váðaískoytinum hevur jaliga ávirkan við sær á eginogn felagsins pr. 1. januar 2019 á 0,3 mió.kr.

### Diskontering

Grundað á broyttar diskonteringsásetingar eru framdar broytingar í diskonteringsrentuni í árinum.

### Aðrar broytingar

Umframt broytingar í nýttum roknskaparhátti eru gjørdar broytingar í framløguni av rakstrinum og skyldum sambært kunngerð nr. 4.

Samanberingartøl í rakstrinum, fíggjarstøðuni og lyklatøl í hálvársfrásøgnini eru tillagað broytta roknskparháttin.

Tað hevur ikki verið gjørligt at tillaga høvðs- og lyklatøl fyri tíðarskeiðið 2015–2017 í 5 ára yvirlitinum í mun til broytta roknskaparháttin.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, íroknað virðisjavning av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – íroknað tryggingarveitingar, broyting í avsetingum og av- og niðurskrivingar – sum er við til at røkka ársins inntøku.

## Konsernviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreidd til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virði á ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum um, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

## Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursi flytingardagin.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í útlendskum gjaldoyra verða umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

## Rakstrarúrslit

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri hálvári 2019 eftir íkastmeginregluni (contribution), sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

## Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 4.

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri 2019 hjá Betri Pensjón P/F.

Hálvársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 30. juni 2019, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2019 - 30. juni 2019.

Tað er okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin gevur eina rættvísandi umrøðu av gongdini í virkseminum hjá Betri Pensjón P/F og fíggjarligu støðuni, umframt eina rættvísandi lýsing av teimum týðandi váðunum og óvissu tættunum, sum felagið kann ávirkast av.

## Stjórn

**Betri Pensjón P/F**

Tórshavn, 4. september 2019

**Helgi Lamhauge Petersen**
Stjóri

## Nevnd

| | |
|---|---|
| **Bogi Petursson Nielsen**<br>Nevndarformaður | **Evy J. Jacobsen** |
| **Herjolvur P. Jakobsen** | **Petur Elias Nielsen** |

# Partafelagsupplýsingar

### Felagið

Betri Pensjón P/F

| | |
|---|---|
| Skrás. nr.: | P/F 4627 |
| Roknskaparár: | 13 |
| Heimstaður: | Tórshavn |

### Nevnd

Bogi Petursson Nielsen, nevndarformaður
Evy J. Jacobsen
Herjolvur P. Jakobsen
Petur Elias Nielsen

### Stjórn

Helgi Lamhauge Petersen, stjóri

**Betri Pensjón P/F**
Kongabrúgvin
Postsmoga 329
110 Tórshavn

Tel +298 348 700
pensjon@betri.fo
www.betri.fo